Einki kom burturúr

Landsstýrið vil hava heimahjálpararnar 13,37% niður í løn, men tað siga heimahjálpararnir nei til. Sáttmálin er longdur fram til 11. juni

Heimahjálparafelag Føroya ætast av kravinum, sum landsstýrið hevur lagt fram um lønarskerjing. Landsstýrið vil hava heimahjálpararnar 13,37% niður í løn.

Hetta krav er meint í álvara, váttar Jógvan Páll Háberg á lønardeildini í Tinganesi. Onnur alment lønt fóru fyrr í ár niður 8,5%, men lønin hjá heimahjálparunum fór ikki niður tá. Fyri at heimahjálpararnir skulu missa tað sama, má teirra løn longur niður nú, sigur landsstýrið.

Sunneva Tyril, forkvinna í Heimahjálparafelagnum, væntar harðar samráðingar. Einki kom burturúr fyrsta fundinum, ið var fríggjadagin. Okkurt smávegis bar til at tosa um, men landsstýrið vísti øllum, ið kostar pengar, frá sær.

Heimahjálparafelagið vil ikki hoyra um at lækka lønina hjá heimahjálparunum. Tað ber stutt sagt ikki til, sigur Sunneva Tyril.

- Ikki bara er realløkin so nógv fallin, men heimahjálpararnir eru settir so nógv niður í tíð, at inntøkan er farin niður í einki, sigur Sunneva Tyril.

Flestu heimahjálpararnir hava bara arbeiði 20 tímar um vikuna, og tá er lønin góðar 7.000 krónur um mánaðin. Longur niður kunnu tær ikki fara í løn.

- Aftrat tí skulu vit skunda okkum nógv meira nú. Hús, sum vit fyrr fingu fýra tímar um vikuna at vaska í, fáa vit nú bara ein tíma fyri.

Ikki ráð at hava bil

Eitt av krøvunum hjá heimahjálparunum til nýggja sáttmálan er samsýning fyri nýtslu av egnum bili. Men tað vil landsstýrið ikki hoyra um.

Hetta heldur Sunneva Tyril vera sera órættvíst. Nógvastaðni noyðast heimahjálpararnir at hava bil fyri at kunna arbeiða, og tær, sum hava bil fáa eisini arbeiðini, har langt er millum húsini. Tann, sum noyðist at hava bil, kann ikki upp á nakran máta fara 700 krónur aftrat niður í løn, sigur Sunneva Tyril.

- Verða vit settar meira niður, so verður einki við at koyra í egnum bili. Tað verður dýrari fyri stovnin, tí so mugu vit hava løn fyri ta tíðina, sum tað tekur at ganga millum húsini, og tað kunnu vera tímar.

Hon heldur kravið hjá landsstýrinum vera órímiligt, eisini tí heimahjálpararnir hava verið so lagaligir. Tær hava funnið seg í at verða settar so nógv niður í tíð, men nu halda tær seg vera nóg mikið skerdar.

- Vit hava eisini gjørt vart við, at stovnurin hevur skorið so nógv niður, at hann hevur hildið játtanina, og tað er tí vit hava verið so hampiligar, sigur Sunneva Tyril.

Á fundinum fríggjadagin varð avtalað at leingja sáttmálan fram til 11. juni. Nýggjur samráðingarfundur verður eina viku eftir hvítusunnu.

randi

Anna Larsen nýggjur stjóri

Nevndin fyri Føroya Brunatrygging samtykti á fundi mánadagin at heita á Onnu Larsen í Porkeri um at vera fyribilsstjóri fyri tryggingini frá 1. juli. Tað hevur hon játtað.

Anna Larsen er formaður í nevndini fyri Brunatryggingina. Hon hevur áður starvast har í 10 ár.

Suni Joensen, sum er stjóri, hevur sagt upp til 1. juli. Hann hevur játtað at vera til hjálpar.

Landsstýrið hevur heitt á nevndina um ikki at seta nýggjan stjóra, tí tryggingarlógávan verður øll endurskoðað. Tað hevur nevndin tikið til eftirtektar, og lýst verður ikki eftir nýggjum stjóra fyrr enn 1. oktober. Tað veldst alt um, hvat landsstýrið ætlar til ta tíð, og hvør löggávan verður, sigur Trygvi Guttesen, næstformaður í nevndini fyri Føroya Brunatrygging.

randi

Trý nýggj fólk í Landsbankan

Hálvan juni verða starvsfólkini í Landsbankanum fimm í tali.

Til fyri stuttum vóru teir bara tveir, stjórin Sigurd Poulsen og fulltrúin Jens Erik Magnussen, men nú eru trý fólk sett aftrat, tveir búskaparfrøðingar og eitt bankafólk.

Búskaparfrøðingarnir eru Jonhard Eliassen, sum er byrjaður í Landsbankanum og Kaj Johannesen, sum hevur verið stjóri í Menningargrunninum. Hann byrjar hálvan juni.

Nýggja bankafólkið í Landsbankanum er Helen Højgaard, hon er byrjað í starvinum.

randi

Kanna alibrúkini

Arbeiðseftirlitið fer nú út at vitja alibrúkini og smoltstøðirnar fyri at kanna, um tey fylgja galdandi reglum viðvíkjandi trygdini.

- Lívið er eittans, og sjálvt um vit vita, at figgjarstøðan í alivinnuni ikki er góð, so ræður kortini um at verja seg sum best fyri at koma undan heilsuskaða, tí vit vita, at hópur av vandamiklum evnum verða brúkt, dálkingin er stór og vandin fyri at detta á sjógv er eisini stórur, skrivar stjórin á Arbeiðseftirlitinum, Eli Davidsen, í blaðnum hjá stovninum Trygd & Trivni.

Ætlanin við vitjanini er at leiðbeina um trygdar- og heilsuspurningar, men verða grov brot á galdandi reglur, verður ákæra reist móti arbeiðsgevaranum uttan bøn.

Blaðið Trygd & Trivni, ið er tað næsta í ár, hevur hesu ferð mest upplýsandi tilfar, um vernarfótbúna, um luftreinsarar, um vandamikli evni o.a. Greitt verður eisini frá kvikksilvurkanningini í Føroyum av børnum.

Av øðrum tilfari í blaðnum kann t.d. nevnast, at Eyðun Elttør hevur gjørt eitt yvirlit yvir hermetikk- og niðursjóðingarvirki, ið eru ella hava verið í Føroyum. Tað er eitt søguligt yvirlit við brotum úr ymiskum, ið hevur verið skrivað um virkini.

randi

Gloyma at boða frá

Í flestu førum, tá Tryggingarsambandið noyðist í rættin fyri at fáa biltryggingargjald inn, er orsøkin, at fólk ikki hava boðað frá, tá bilurin skifti eigara

Sum hjá so nógvum øðrum fyritøkum stendur á hjá Tryggingarsambandi Føroya at fáa pengar. Ofta er neyðugt at fara í rættin.

Tað er ikki nakað nýtt, men tað eru nú fleiri enn áður, ið enda í rættinum. Í hvussu er tá ræður um biltryggingar. Listin er langur.

Niels Juel Akraberg Poulsen heldur ikki, at fólk flest gjalda so nógv verri, men tey mongu sakarmálini hava fyri ein stóran part samband við, at nógvir bilar skifta eigara í hesum tíðum.

- Tá fólk selja bilin, gloyma tey at boða tryggingini frá, at bilurin hevur skift eigara. Tað er ikki nóg mikið at ringja, tryggingin skal hava boðini skrivliga, sigur Niels Juel Akraberg Poulsen.

Tað er heilt vanligt at fólk koma illa fyri av hesum. Tey selja bilin í tí trúgv, at keyparin yvirtekur allar skyldur. Men um hann ikki rindar, stendur gamli eigarin fyri skuldini, og Tryggingarsambandið reisir kravið ímóti honum.



Nógvir bilar skifta eigara í hesum tíðum, og tað er ein orsøkin til, at nógv krøv fyri biltrygging enda í rættinum

Eitt annað slag av málum, biltryggingin stríðist við, er tá fólk hava havt ein bil, ið bilhandlarin hevur tikið inn aftur. Fólk gloyma eins og í hinum førunum at boða tryggingini frá, at tey hava latið bilin frá sær. Tað rætta hjá teimum er at boða frá og at taka pláturnar, tí tá sleppa tey bæði undan at gjalda biltrygging og vegskatt. Tað kunnu tó vera ávísir trupulleikar við at sleppa undan tryggingini, um bilurin er fíggjaður gjøgnum bilfíggingarstovn.

randi